Myndir: Jens Kristian Vang

Vit eru máli› sum vit tosa

– Vi›urskiftini hjá føroyskum rithøvundum eru ikki serliga gó›. Føroyar er ta› einasta landi› í heiminum, sum ikki letur naka› nevnivert til listafólk. Ta› syndri›, sum er komi› aftrat á hesaví›ka›u kunnger›ina frá Mentunnargrunninum, er ikki nógv. Ta› at listafólk nú kunnu fáa starvsløn í hálvt ár, eitt ár og tr‡ ár, er ein skipan, sum ikki er í samsvar vi› tær a›rasta›ni, sigur Carl Johan Jensen, rithøvundur m. a. í samrø›u vi› Sosialin

Oddfrí›ur Marni Rasmussen

Eg havi altí› hildi› um Carl Johan Jensen, at hann er helst tann ma›urin í tí føroyska mentakjakinum, sum torir at siga sína meining, óansæ› hvussu hon so ver›ur móttikin. Ta› er gott at hava ein so erligan mann innan fyri tann listarliga heimin. Tí hesin heimur ber brá av at tiga tingini íhel. Ein danskur vinma›ur hjá mær seg›i einafer›, at mann skuldi trú›, at føroyingar fingu bót fyri at opna munnin. Hetta kann í hvussu so er ikki sigast um Carl Johan Jensen. Heima hjá honum spurdi eg hann:

Hvussu heldur tú, at vi›urskiftini eru hjá føroyskum rithøvundum?

Tey eru ikki serliga gó›. Føroyar er ta› einasta landi› í heiminum, sum ikki letur naka› nevnivert til listafólk. Ta› syndri›, sum er komi› aftrat á hesaví›ka›u kunnger›ina frá Mentunnargrunninum, er ikki nógv. Ta› at listafólk nú kunnu fáa starvsløn í hálvt ár, eitt ár og tr‡ ár, er ein skipan, sum ikki er í samsvar vi› tær a›rasta›ni. Ein broyting, sum kundi veri› gjørd, er ta›, sum teir brúka í Írlandi. At tú ikki rindar skatt av teimum pengunum, tú fær av tínum listarliga arbei›i. At listafólk ver›a undantikin skatt upp til 150.000 ella 200.000 krónur. Men ta› er ein sovor›in óvilji móti at gera naka› vi› hetta yvirhøvur.

Er ta› tí, at landi› skal gjalda, at ilviljin er so stórur?

Eg haldi, at ta› hongur saman vi›, hvussu landi› hevur veri› st‡rt. Undir heimast‡risskipanini hevur veri› eitt sovor›i seráhugamál, eitt ney›vendigt fólkaræ›i. Mann kann samanbera ta› vi› Frambur›sflokkin í Norra. Teir røkja bara seráhugamál, uttan at taka hædd fyri heildini. Í Føroyum hevur ongin hugsa› um samfelagsheildina yvirhøvur. Ta› er ein illvild ímoti allari mentan, tí mentan handlar um at hugsa um heildina. Mann fær ikki nakran beinlei›is vinning burturúr hesum beinanvegin, og so dettur listin burtur sum politiskt áhugamál.

Ta› er bara Mentunnargrunnurin, sum letur pengar til listafólkini. Er ta› so ikki heilt burturvi›, at hann skal eita so? Kundi hann so ikki iti› listagrunnurin ella okkurt anna›?

Ja, hatta sigur eisini, hvussu lítil vitan er um ta› umsitingarliga. Altso ongin veit umsitingarliga, hvat mentan merkir. Summi vilja hava bæ›i ítrótt og anna› vi›, ísta›in fyri at ta› skal vera skapandi list, punktum.Ta› er ongin grund til at hava fótbólt upp í mentunnarpolitikki, men heldur hava ta›, sum vi› grannalondunum, at "kultupolitikkur" er sjónleikur, mentunnarhús, myndlist, tónleikur og skaldskapur o.s.f. Ta› kann gott vera, at ítróttur og list hoyra undir sama rá›harra, men ongin fer í fullum álvara at siga, at ítróttur er mentan. Tú sær ta› bara, um tú opnar eitt bla›. Undir "kulturside" sær tú onki um fótbólt. Men í Føroyum hevur tú hug at blanda alt saman. Ta› eru eisini politikkarar, sum liggja framvi›, at ta› skal ver›a so breitt sum møguligt. Politikkararnir í Klaksvík rokna›u einafer› út, at ta› fór hálv onnur milliard til føroyska mentan. Altso, hvat hugtak liggur aftan fyri hetta. Vit vita, at tann skapandi listin fær 2,5 milliónir til Mentunnargrunnin og eitt sindur fer til at játta ymiskt anna›. Ta› ver›a lætnar einar 6 milliónir til føroyskt mentunnarlív tilsamans, og ta› ver›ur hildi› at vera nógv, men hetta er onki í mun til, hvat anna› kostar. Sum flestum kunnugt, so skulu einar 40. milliónir til, um eitt føroyskt mentunnarlív skal ver›a til naka›. Og av øllum londum rundan um okkum, bæ›i í eystur og vestur, so brúka vit nógv minst av fíggjarlógini til skapandi list.

Nú hevur tú fingi› 100.000 krónur sum løn frá Mentamálast‡rinum. Skal naka› krav fylgja vi› um, at tú skal lata naka› sjónligt úr hondum, tá i› tú hevur fingi› pengarnar?

Eg skuldi vísa á, at eg hev›i eina verkætlan og sendi teimum einar fimm sí›ur, so hava teir eisini ta›, sum liggur á prenti. Ta› var onki krav um, at eg skuldi hava okkurt li›ugt at leggja fram, men eg haldi, at ta› átti at veri›, í hvussu so er innan fyri eitt tí›arskei›. Nú ver›ur henda verkætlanin eitt sindur størri enn eg hev›i rokna› vi›. Kanska má eg brúka eitt á aftrat, men ta› er klárt, at ta› skal vera verkætlanarbundi›, og at tú kann vísa á, at okkurt er komi› burturúr. Ta› má vera skil í teimum pengunum, sum ver›a lætnir til ymisk listarlig verk.

Hevur tú so skriva› meir? Og er ta› betr,i sum tú skrivar?

Ja, eg havi skriva› meir. Eg skrivi frá klokkan átta til fimm. Uttan døgver›a. Sjálvur haldi eg, ta› er vor›i› betri. Ta› skal vera eitt krav sum sigur, at tú átti at fingi› meir burturúr, enn um tú ikki fekk hesa lønina.

Hvør skal so sita sum ein slíkur smaksdómari?

At taka stø›u til tann spurningin er ongin vísind. Men eg haldi, at fólk, sum mann hevur álit á, kunnu veljast inn í slíkar nevndir, og sum skulu skiftast út vi› jøvnum millumbilum. Og ta› behøvast ikki bara at vera føroyingar í eini slíkari nevnd. Ta› eru fólk rundan um okkum, sum kanska ikki skilja føroyskt, men sum sanniliga duga at lesa føroyskt. Og eitt, sum eg haldi átti at veri› gjørt ø›rvísi er, at vit er so bundin at Danmark. Alt samband vi› umheimin fer› gjøgnum Danmark. Vit eru so blind vi›víkjandi sambandi vi› onnur lond. Tú fært ikki eingongd nor›urlendskar bøkur í føroyskum bókhandlum. Ta› fær ikki Katrinu Frostenson á svenskum. Ikki fyrr enn bøkurnar ver›a umsettar til danskt, kann mann keypa tær. Hví kan mann ikki keypa Jan Kærstad á norskum?

Fer tú inn í eín íslendskan bókhandil, so fær tú bøkur á øllum heimsmálum. Fer tú inn í ein føroyskan bókahandil, er eitt líti› jørn vi› enskum metsølubókum. Anna› finnur tú ikki. So kann tú sjálvandi siga ta›, at eitt umskifti er komi› í vi›víkjandi alnetinum. Tú kann ogna tær bøkur ha›ani. Ta› er ikki so, at vit skulu slíta alt samband vi› Danmark. Verri enn so, men ta› er upp á tí›ina, at vit fara at hyggja eftir ø›rum londum. Ongantí› ov skjótt.

Hvat kann gerast fyri at forbetra hesi vi›urskiftini?

Ta› skal eitt ávíst sinnalagsskifti til. Ta› hevur veri› merkt av teirri politisku skipanini, sum hevur veri›, hon hevur ikki hjálpt fólki at hugsa út um síni egnu trongu áhugamál. Her komu flakavirki í hvørja einastu bygd, og fólk vistu, at tey ikki kundu standa upp og ni›ur. So kravdu tey, at ta› almenna sp‡tti í kassan. Ta› var› ikki hugsa› um heildina. Tey, sum fingu eitt flakavirki í sínari bygd, skitu á, hvussu ta› gekk a›rasta›ni. Eisini ta›, at summi siga, at ein ávísur partur av Javna›arflokkinum gjørdi verkamannin til ein sjálvstø›ing, ísta›in fyri at gera hann til ein ábyrgdarfullan veljara. Ta› er ta›, sum samfelagi› var› gjørt til. Teir eldru politikararnir vilja aftur til ta gomlu skipanina, teir eru vandir upp at hugsa um seráhugamál í samfelagnum, teir vita ikki, hvat teir skulu gera, tá i› teir skulu taka stø›u til heildina, og at heildin skal vera ta›, sum st‡rir politikkinum, samstundis sum teir skulu taka stø›u til mentan. Teir flestu sita bara og klóra sær í høvdinum.

Men tá i› talan er um mentunnarpolitik. Er ta› so ikki frægari, at hvør kommuna hevur ábyrgd fyri sínum mentunnarpolitikki?

Ta› kann sjálvandi leggja ein ávísan part av kostna›inum á eitt anna› sta›. Vi›víkjandi rithøvundum, so kundu teir fari út á skúlarnar at møta sínum komandi lesarum, ta› samstarvi› millum høvund og undirvísingarkervi›, ta› kundi lutfallsliga veri› fíggja› ígjøgnum kommunurnar. Men eg havi onki álit á, at kommunurnar kunnu bera ta› mentunnarpolitisku skyldurnar. Eg hugsi, at tær stóru kommunurnar, eitt nú Tórshavnar kommuna kunnu fíggja ein part, men som heild haldi eg, at ta›, sum skal til er at or›a ein mentunnarpolitik, sum heldur eini fimmtan, tjúgu ár fram í tí›ina.



Ta› eru eisini politikkarar, sum liggja framvi›, at mentanin skal ver›a so brei› sum møguligt. Politikkararnir í Klaksvík rokna›u einafer› út, at ta› fór hálv onnur milliard til føroyska mentan

Ta› sum er hent í seinastuni er, at mann hevur fingi› eitt samfelagskjak og vi› hesum er givi› pláss fyri einum mentunnarkjaki. Altso, spurningar so sum: Hvat eru vit? Vit eru máli› sum vit tosa. Og hetta er ein so miki› stórur partur av tí føroyska tilvitinum. Sjálvandi er hetta eisini ein spurningur um pengar, men er ein líka stórur spurningur um ta›, at samfelagi› veitir eina tænastu. Hava vit gó›tiki›, at vit eru føroyingar? Hava vit gó›tiki› ta› føroyska máli›? So er ta›, sum vit rithøvundar framlei›a naka›, sum samfelagi› hevur brúk fyri. Stø›an hjá samfelagnum harafturímóti er tann, at vit skulu veita teimum tænastuna uttan sams‡ning. Um tú lesur t.d. lei›aran í Dimmu, so er ásko›anin tann, at hvat billa vit okkum inn at forlanga sams‡ning fyri, at veita teimum eina tænastu. Tú rindar fyri ein støvsúgvara, so hví ikki rinda fyri eina bók. Ta› sum eg meini vi› er, at ta› er ein tørvur fyri teimum tænastum, sum vit veita, altso listafólkini, men hugbur›urin hjá fólki er tann, at vit ikki skulu rindast fyri tær tænastur, sum vit veita teimum. Vilja vit var›veita føroyskt mál, vilja vit var›veita eitt føroyskt mentunnarlív, so mugu vit gjalda fyri ta›.

Ta› finnast ásko›anir í samfelagnum, sum siga sum so, at um mentannin ikki klárar seg sjálv, ja so má hon ni›urleggjast!

Har er ein mótsøgn í hesum. Tí spyr tú hesi somum fólkini um føroyskt mál skal avtakast, so siga tey sjálvandi nei. List kostar pengar, og í Føroyum hava vit ein lítlan markna› og tí má rindast í samsvar vi› markna›in. Men ta› skal vera skil í. Ikki eftir tí gamla lagnum, at eg fái eina stemmu frá tær, so fær tú eitt sangkór.

Í hesum fullveldiskjakinum havi eg ikki hoyrt eitt or› um, hvussu ein komandi mentunnarpolitikkur skal or›ast!

Ta› var einafer› eitt kjak á Landsbókasavninum í mei 1999. Men har kom onki burturúr. Fullveldi› er ein møguleiki at skapa ein føroyskan mentunnarpolitik, og at gera ta sinnalagsbroytingina, sum ger, at vit fara at seta eitt sindur hægri á, enn vit higartil hava gjørt. So at ongi hálvánalig verk ver›a givin út. Ta› hevur veri› sagt so: Ta› ger onki, um ein vánalig bók kemur út, vit eru bara føroyingar. Og ta› er eisini stuttligt at lesa um teir gomlu gar›arnar í Havn. Ta› hevur onki vi› bókmentir at gera. Hetta, at seta verulig krøv til dygd. Nei, ta› kunnu vit ikki gera, tí ta› er føroyskt. Tí hugsunnarháttinum eiga vit at sleppa okkum av vi›. Ta›, sum er føroyskt, eigur og skal vera gott. Innan fyri myndlist og sjónleik er stø›i› hækka›. Fólk samanbera vi› ta›, sum tey sígggja í sjónvarpinum. Fólk siga sína meining, tá i› talan er um myndlist og sjónleik, men ikki bókmentir.

Í Norra er ta› oljuvinnan, sum stu›lar mentannini mest, hvussu ver›ur í Føroyum, um oljan kemur?

Í Norra er ta› eitt sosialdemokratiskt fyritakandi, sum hevur lagt meir í mentunnarliga umsiting enn um mentan. Ey›kenni úti á bygd í Norra er, at teir byggja ein stóran mentunnarkarm, og so eru ongir pengar eftir til mentanina. Tá i› øll hava fingi› løn fyri at umsita mentanina, so er ongin løn eftir til listafólkini.

Og tá i› so oljuævintˆri› er av, so hevur mentannin ongar pengar!

Lønarvi›urskifti og anna› er á fíggjarlógini. Og ein partur av bókasavnspengum og ø›rum fer í grunnar. Mær kunnugt eru hetta ikki beinlei›is oljupengar.

Ta› var ein fundur á Landsbókasavninum herfyri, og har seg›i Gunnar Hoydal, at oljuvinnan átti at lat›i ein pott av hørjari tunnu til mentanina. Liggur vandin so ikki í, at mentannin ver›ur forkela› vi› hesum ráevnispengunum, sum einafer› ver›a uppi?

Jú, men ta› kann gerast so, at mann byggir nakrar grunnar upp, sum mann blívur vi› at koyra pengar í, og so tá i› grunnurin hevur fingi› eitt ávíst stovnfæ, so kann ein stórur partur av rentunum fara til mentanina. Ta› kunnu gerast nógvir pengar í einum sovor›num grunni. Men fólk ótolnast. Mann má eisini hugsa um, at ta› tekur tí at byggja hetta upp. Vit hava tvey stór mentunnarøki í Føroyum, sum krevja eina loysn. Anna› er: Hvussu skal ta› listskapandi fíggjast, altso lønir, stu›ul og anna›. Hitt er: Hvussu skal mann fáa føroyska list út til umheimin - ta› mentunnaliga samskifti› vi› umheimin, sum kann fáa føroyska list út í heimin, skal gerast betri. Og hetta er ein longri verkætlan, sum ikki kemur eftir einum degi. Hugsar tú um Ísland. Ta› hevur tiki› teimum hálvtˆ‡s ár at komi› har, teir eru nú. Vit eru jú eisini tær royndirnar ríkari, sum teir hava gjørt, og fyri alt ta›, sum onnur nor›urlond hava gjørt. Munurin á okkum og Íslendingum er tann, at tann føroyski teksturin allatí›ina er í einari ólagaligari kapping vi› danskan tekst í Føroyum. Ta› er eftir mínum tykki tann størsti munurin millum Føroyar og Ísland. Vit hava brúkt nógva tí› at fáa fólk at gó›taka tann føroyska tekstin, men ta› gongur tann rætta vegin.